## Tutl við White Flag og Snjóhvítu




*Tutl gevur út nýggjastu fløguna hjá White Flag. Talan er um eina fløgu, sum er ætlað til sølu á konsertum á heimsumferðini hjá bólkinum*




*Snjóhvíta og Eldførið verða nú endurútgivin á fløgu. Hetta er ein útgáva, sum Herman Jacobsen, sáli, gav út fyri eini 30 árum síðani*

**Fløgan, sum amerikanski punk-pop bólkurin White Flag gevur út í sambandi við sína heimsumferð er nú komin**

ÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*

Fløgan »History is Fiction« við amerikanska bólkinum White Flag er nú komin á marknaðin. Og hesuferð er tað Tutl, sum gevur bólkin út á fløgu.

Fløgan er gjørd í sambandi við heimsumferð, sum bólkurin nú er farin á, og 20 ára jubileumið hjá teimum.

White Flag er mannað við fólkum, sum eru kend úr bólkum sum til dømis, R.E.M, Hole og Dave Davies Band.

Bólkurin ynskti sjálvur at sleppa at geva út á Tutl.

Fløgan er ætlað til sølu á konsertum á teirra heimsumferð, men í Føroyum verður hon eisini at fáa í handlum.

White Flag koma til Føroya í desember mánað.

Umframt at hava givið út fløgu við amerikanska bólkinum, hevur Tutl eisini endurútgivið Eldførið og Snjóhvítu á fløgu. Talan er um eina útgávu, sum Hermann Jacobsen, sáli, á sinni gav út fyri eini 30 árum síðani.

Útgávan er ein liður í ætlanini um at endurútgeva LP-plátur og kassettubond á fløgu.

Á fløguni eru tey bæði Grimmævintýrini um Snjóhvítu og teir sjey dvørgarnar og Eldførið.

## Syngja undir Vestmannasundi

**Í sambandi við at Vágatunnilin letur upp í næstum, verður skipað fyri ymsum tiltøkum**

TÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*

Leygarkvøldið 7. desember verður ein Concerto Grotto undir Vestmannasundi. Konsertin verður klokkan 20.00.

Tað er Tutl, sum skipar fyri konsertini, og tónleikararnir verða: Dávur Juul Magnussen, trombon, Heðin Ziska Davidsen, gittar, Kristian Blak, keyboard, Mikael Blak, bass og Brandur Jacobsen á trummum.

Umframt løg, sum hava verið spæld í Klæmintsgjógv, verða »Sjódregil« og »Marmennil« úr Heygar og Dreygar hjá Kristiani Blak eisini spæld.

Á skránni verða eisini løg hjá Heiðini. Hann hevur skrivað »Funnelvision« til Vágatunnilin.

Atgongumerki fáast í forsølu í Kunningarstovuni í havn, og verða eisini at fáa í Kunningarstovuni í Vágunum. Bussar koyra inn klokkan 20.00 og konsertin er umleið ein tíma long.

# Læra landið at kenna



*Nýtt føroyskt spurnarspæl er nú komið. Talan er um Landastrok, sum Hentzar Steingrímsson hevur gjørt*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Fyrst í næstu viku kemur út nýtt føroyskt spæl. Spælið minnir um útlendska Trivial Pursuit, men bara við føroyskum spurningum**

SPÆL
*Ingrid Bjarnastein*

Landastrok er heitið á nýggja spælinum, sum Hentzar Steingrímsson hevur gjørt. Talan er um eitt borðspæl, sum líkist útlendska Trivial Pursuit.

Føroyingar hava í áravís spælt útlendsk spurnarspøl, og eru hesi spøl, sjálvsagt um útlendsk viðurskiftir. Nógvir av hesum spurningum kunnu tykjast truplir og høpisleysir hjá føroyskum fólki at svara, tí spurt verður um ting, sum vit ikki hava fylgt við í.

Nú er so endiliga eitt føroyskt spurnarspæl komið, sum inniheldur spurningar um føroysk viðurskifti.

Leikararnir fara á eina spennandi ferð frá Fugloynni og suður til Sumbiar. Fyri at sleppa úr einum staði í annað er neyðgt at svara spurningum, sum snýgva seg um søgu, landalæru, náttúru, ítrótt, mentan og almenna vitan.

Hentzar Steingrímsson hevur gjørt spælið, men hann hevur eisini fingið hjálp frá nógvum fólki.

Hannis Egholm hevur staðið fyri listarligu sniðgávuni av spælinum, og felagið Tukan hvur verið millumlið millum forlag og prentsmiðju í Danmørk.

Spæl-høvundurin vónar, at spælið verður onkrum itl gleði, og at tað fer at lata eyguni upp á fólki fyri landinum, sum okkum er givið.

# Clickhaze hitar White Flag

**Tá amerikanski bólkurin White Flag kemur til Føroya í næsta mánað, verður tað Clickhaze, sum fyrst fer á pallin. Føroyski bólkurin skal nevniliga hita upp fyri White Flag á konsertunum í Gøtu**

KONSERT
*Ingrid Bjarnastein*



Clickhaze verður bólkurin, sum hevur fingið heiðurin at hita upp fyri amerikanska punk pop bólkin, White Flag, sum kemur til Føroya í næsta mánað.

Tvær konsertir verða á skránni við White Flag. Onnur í Gøtu og hin í Klaksvík.

Clickhaze hevur ikki spælt alment síðani tey vóru í Íslandi í oktober mánað, og tað er upp aftur longri síðani tey hava spælt alment í Føroyum.

Í Íslandi hevði bólkurin okkurt nýtt tilfar á skránni, og hetta tilfarið er enn ikki framført í Føroyum. Hetta og okkurt annað nýtt tilfar verður væntandi framført fyri fyrstu ferð í Føroyum til hesar konsertir. Jón Tyril, gittarspælari í Clickhaze sigur:

– Eg haldi, at tað er sera spennandi at spæla við einum slíkum bólki, sum er mannaður við fleiri kanónum úr amerikanska tónleikalívinum. Tað er ikki hvønn dag, at tú sleppir hetta í Føroyum. Hetta kann eisini verða við til at skapa góð sambond tann vegin. Harafturat, er Losjan, eftir mínum tykki tað besta spælistaðið í landinum, og vit hava eisini góðar royndir við at spæla í Klaksvík, so eg gleði meg.

Konsertirnar verða í Losjuni í Gøtu fríggjakvøldið 13. desember klokkan 22.30 og í Borgini í Klaksvík, leygardagin tann 14. desember klokkan 24.00. Atgongumerkini kosta 150 krónur, men ert tú limur í Grót ella Sjey00, kosta tey 125 krónur.



# Eitt stríð um upplýsingar

**Ein nýggj gjaldsskipan hjá peningastovnunum hevur fest í eitt viðkvæmt stríð, ið snýr seg um meg og teg. Skipanin krevur nevniliga, at persónsupplýsingar verða sendar av landinum. Tað er ikki loyvt sambært lógini, men málið er fløkt, og peningastovnarnir tvíhalda um, at GjaldsSkipanin lýkur lógina**

BAKSÝNI
*Ingi Rasmussen*




*Bankarnir stríðast við Landsstýrið um rættin til at brúka persónsupplýsingar. Jørn Astrup Hansen, bankastjóri og nevndarformaður í Elektron, Høgni Hoydal, landsstýrismaður, og Kristian Magnussen, løgtingsmaður, tulka hvør í sínum lagi, hvat Løgtingið meinar*
*Myndgerð: Álvur Haraldsen*

Eitt óvanligt stríð hevur tikið seg upp í Føroyum. Eitt stríð millum størstu valdssúlurnar í samfelagnum. Millum politisku skipanina og fíggjarheimin. Millum landsstýrið, løgtingið og bankakervið. Millum lóggevandi og útinnandi valdið øðrumegin, og peningavaldið hinumegin.

Stríðið er komið til sjóndar í einum opnum orðadrátti í fjølmiðlunum millum ein landsstýrismann og ein bankastjóra. Tað, teir stríðast um, eru persónligir upplýsingar. Upplýsingar um teg og meg. Eymir upplýsingar um míni og tíni fíggjarligu viðurskifti.

### Sjáldsom vápn

Í royndunum at vinna stríðið hava vit sæð nøkur sjáldsom fyribrigdi síðstu tíðina.

Ein heilsíðulýsing frá peningastovnunum og P/F Elektron, har lagt verður eftir einum landsstýrismanni, og sjónarmið verða framborin, er eindømi í føroyskari søgu.

Landsstýrismaðurin hevur svarað aftur í heilsíðugrein í Fregnum, har hann setir eitt demokratiskt spurnartekn við, um peningastovnarnir eru um at vinna sær valdið við einum skipaðum trýsti á politisku skipanina. Fimta statsvaldið tekur yvir, er ræðumyndin.

Frammanundan hava vit í bløðunum sæð tíðindaskriv, yvirlýsingar og lesarabrøv frá framstandandi stjórum og nevndarformonnum í peningaheiminum.

Okkurt heilt serligt man vera áfatt, síðan okkara upplýsingar hava so stóran týdning fyri politikaran og bankastjóran.

### Eitt greitt yvirlit

Alt snýr seg um eina nýggja skipan, ið peningastovnarnir fyrr í ár settu í verk í Føroyum. Hon nevnist GjaldsSkipan (GS).

Skipanin er ment í samstarvi millum Elektron og Pengeinstitutternes Betalings Systemer (PBS) í Danmark og er ein føroysk útgáva av væl kenda BetalingsService hjá PBS.

Talan er sostatt um sjálvvirkandi peningaflytingar, sum fara til Danmarkar at venda og avgreiðast. Higartil hevur skipanin virkað soleiðis, at PBS hevur gjørt eitt yvirlit, sum føroyski brúkarin hevur fingið. Frameftir verður hetta gjørt á Elektron, og viðskiftafólkini hjá bankunum fáa eitt yvirlit yvir sínar føstu flytingar á føroyskum.

Skipanin avloysir ta føroysku V&T-skipanina, sum er ein einføld skipan, ið Eletron hevur ment. Tað nýggja við GjaldsSkipanini er, at skuldarin hvønn mánað fær eitt greitt yvirlit, sum vísir, nær og hvussu nógv konta hansara verður skuldskrivað, til hvønn goldið verður, og hvat goldið verður fyri. Sostatt hevur gjaldarin eitt nú møguleika at steðga flytingum, sum hann ikki vil kennast við.

### Forða misnýtslu

Kjarnin í stríðnum er í grundini eitt gamalt mál. Spurningurin er, hvørt vit skulu loyva, at persónligir upplýsingar um einstaklingar fara av landinum.

Høgni Hoydal landsstýrismaður sigur kortanei og sigur seg bara verja tað, sum løgtingið hevur samtykt og álagt honum at gera. Peningastovnarnir siga ja og vísa til, at Dataeftirlitið, sum skal geva loyvi í slíkum málum, hevur játtað, at skipanin er í samsvari við lógina.

Lógargrundarlagið er Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 og kunngerð frá 17. desember 2001 um flyting av persónsupplýsingum til útlond.

Lógin hevur til endamáls at verja einstaklingin ímóti misnýtslu av persónsupplýsingum, ið verða lýstir sum »einhvør upplýsing og meting knýtt at einum ávísum persóni«. Tað er sostatt ongin ivi um, at upplýsingar, ið GjaldsSkipanin fevnir um, koma undir lógina.

Meginreglan í lógini er, at persónsupplýsingar, sum koma undir lógina, skulu varðveitast og viðgerast í Føroyum. Lagt verður kortini afturat, at »persónsupplýsingar kunnu bert flytast til útlond, sum tryggja eina fullgóða viðgerð av upplýsingum«.

Har stendur stríðið.

Eletron og bankarnir vísa á, at ongin ivi er um, at PBS til fulnar lýkur øll hugsandi krøv. Og teir verja seg eisini við, at upplýsingar um navn skuldarans og saldo á kontu verða einans skrásettir á Elektron.

### Vilji tingsins

Spurningurin er so, hvat løgtingið vildi, tá nýggja lógin um viðgerð av persónsupplýsingum varð samtykt í 2001.

Høgni Hoydal landsstýrismaður vísir til, at Rættarnevndin hjá løgtinginum álegði honum »at áseta greiðar reglur í kunngerð um flutning av persónsupplýsingum til útlond, herundir at steðga ella avmarka útflutning«. Rættarnevndin legði somuleiðis áherðslu á, at »meginreglan er, at persónsupplýsingar, sum koma undir hesa løgtingslóg, skulu varðveitast og viðgerast í Føroyum«.

Nú Dataeftirlitið hevur givið Eletron og peningastovnunum loyvi at útflyta persónsupplýsingar uttanlands, ætlar Høgni Hoydal at gera eina nýggja kunngerð, sum herðir forboðið móti útflutningi. Tí tað hevur hann fingið álagt av løgtinginum, sigur hann.

Nú gerst málið eisini eitt flokspolitiskt stríð. Tí nú er eisini ósemja um, hvat tað var, løgtingið í grundini samtykti.

### Trygg skipan

Kristian Magnussen, løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin, sum var við til at samtykkja uppskotið, er ikki samdur við Høgna Hoydal. Tað var ikki hansara vilji at forða fyri, at danska gjaldsskipanin varð brúkt og lagað til føroysk viðurskifti, sigur hann.

– Eftir mínum tykki loyvir lógin, at upplýsingar kunnu flytast av landinum, um tað er sannlíkt, at lóggávan verjir einsaklingin líka væl sum føroysk lóggáva. Eg eri sannførdur um, at tað neyvan finst ein saklig grundgeving fyri at halda, at donsk lóggáva ikki tryggjar borgaran líka væl ella betur enn okkara egna, tá persónsupplýsingar verða viðgjørdar, sigur hann.

Løgtingið fær høvið at viðgera málið í næstum, tá Høgni Hoydal svarar fyrispurningi frá Kristian Magnussen í málinum.

## FAKTA

- Løgtingið samtykti í 2001 eina lóg um vernd av persónsupplýsingum.
- Meginreglan er, at persónsupplýsingar, sum koma undir hesa løgtingslóg, skulu varðveitast og viðgerast í Føroyum. Persónsupplýsingar kunnu bert flytast til útlond, sum kunnu tryggja eina fullgóða viðgerð av upplýsingum.
- Bankarnir eru farnir at nýta eina sjálvvirkandi GjaldsSkipan, sum flytir persónligar upplýsingar av landinum.
- Við GjaldsSkipaninini fær kundin hvønn mánað eitt gjaldsyvirlit, ið vísir nær, til hvønn og hvussu nógv kontoin verður skuldskrivað komandi mánaðin.